# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Birgit Hentze 70 ár

Mikudagin 23. mars fyllir Birgit Hentze í Skopun 70 ár.



Birgit er fødd og uppvaksin í Skopun. Hon byrjaði at arbeiða í Búrhandlinum hjá abba sínum, har hon eisini gekk við posti. Seinni bleiv hon gift vid Melanchthon W. Hentze og fingu tey 5 børn: Harry, Fríðhild, Ella, Hildur og Maj-Britt.

Birgit hevur arbeitt á flakavirkinum í Skopun sum álitskvinna, og hevur verið skrivari hjá arbeiðsmannafelganum í 16 ár. Hetta var ólønt arbeiði, so tað var áhugin ið dró.

Hon var við til at seta kvinnufelagið Vónina á stovn, og var skrivari har í 20 ár. Eisini sat hon eitt skeið í Skopunar kommunu. Síðan bleiv maður hennara sjúkur, og hon gavst við at arbeiða fyri at vera heima og passa hann.

Í dag er hon pensionerað, og henni dámar væl at brúka tíðina við at ganga á kvøldskúla. Hervið er hon blivin skørp við telduni, so hon kann samskipa við øll síni uttanlands.

Hon kemur saman við pensionistunum í Diduhúsinum í Skopun, og er eisini luttakari í tilhaldinum á Sandi.

Vit børn, ommubørn, langommubørn og svigarbørn takka henni fyri alt tað hon er og hevur verið fyri okkum og ynskja henni hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Vit gleða okkum til at halda dagin saman við henni og teimum, ið hava hug at gera dagin hugnaligan við at støkka inn á gólvið í Samljóð tann 23. mars 2005 kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

**23. mars. Fidelis.** Sigst at vera halgimenni, sum varð tikið av døgum í Afriku í 5. øld, men annars vita teir einki um hann. Fidelis merkir *tann trúfasti.*

*Rasmus Effersøe doyði hendan dagin í 1916.*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 100 ára føðingardegi mínum norðuri við Gjógv. Ein serstøk tøkk til Sunda kommunu, til Kingobólkin í Tjørnuvík og til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim fyri tann stóra heiður tit sýndu mær á føðingardegnum.

Við ynskjum um gleðiligar páskir og Guds signing.

**Karl Jacob Sigvardsen**

# Lis Nolsøe 80 ár

Annan páskadag kann mamma hátíðarhalda sín 80 ára føðingardag.



Hennara upphav sum klaksvíkingur tók sína byrjan í 1885, tá abbi okkara, Mouritz Winther, flutti heiman av Sandi og norður til fastrina Sigrid Mariu, sum var gift við Nickels Lutzen.

Í 1910 giftist Mouritz við Onnu Karolinu Theodoru (f. Gaard). Omma var úr Oyndarfirði, og saman fingu tey sjey børn. Mamma er tað yngsta av teimum.

Mouritz var tá 56 ára gamalur, og tí eru næstan hundrað ár ímillum Mourtiz abba og yngsta abbabarnið, Eyðun, sum er føddur í 1966. Tað er tí rættuliga hugvekjandi, at mamma er uppald av einum pápa, sum varð føddur einans 13 ár eftir at einahandilin varð avtikin í 1856.

Mamma er tað einasta av systkinunum, sum varð verandi í Klaksvík hjá foreldrunum.

Pápi okkara, Eli, kom beint eftir kríggið til Klaksvíkar at arbeiða hjá sýslumanninum. Her møttust tey bæði, og eftir at tey vórðu hjúnavígd 11. juni í 1945 í Vágs kirkju, búsettust tey í Víkunum, beint oman fyri barnaheimið hjá mammu, og bygdu heim okkara har.

Eftir 20 árum høvdu okkara kæru foreldur fingið øll okkum nýggju systkin undan. Sanniliga ein stórur flokkur nú á døgum. Men hóast tað, so vuksu vit upp í einum livandi og tryggum heimi, uttan nakrantíð at mangla nakað.

Meðan pápi okkara tey flestu árini arbeiddi sum skrivstovumaður, og í eini 10 ár í Løgtingi og Landsstýri, stóð mamma á odda í tí barnaríka heiminum.

Vit hava allar orsøkir til at ynskja tær, góða mamma, hjartaliga tillukku á stóra degnum. Takk fyri alt tað, sum tú hevur verið fyri okkum. Vónandi fáa vit nógv góð ár afturat saman. Tað skal vera okkara inniliga ynski, at tú framvegis verðveitir títt fríska, unga sinnið og tína friðsælu á lívsins kvøldarstund. Í okkara hjørtum ert tú, og fert tú altíð at liva, sum ein vinarlig áminning um, at tann kærleikin, sum tú og babba valdu, er ein livandi máttur og ein stinn hella hjá okkum at byggja á.

**Børnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýndu samkenslu, tá okkara høgt elskaði sonur, beiggi og svágur

**Ingi Naresh Petersen**
**Norðragøta**

doyði og varð jarðaður.

Ein serlig tøkk til øll, sum hjálptu á ymsan hátt.

**Dagfinnur, Dagny,**
**Anita, Terji og Eyðvør**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Óla Jákup Gaard Olsen (Agga)**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Hera Joensen, Ingu Poulsen Dam og Agnar Nielsen fyri troystarrík orð í kapellinum og missiónshúsinum.

Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, gravarar, berarar og øll, sum hjálptu til. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna.

Tøkk øll somul, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ragna**